# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2008





# RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2008

Samtak | Norðoya Sparikassi

| 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK | Viðm. | | 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| 73.216 | 56.936 | 1 | Rentuinntøkur | 73.520 | 57.523 |
| 42.510 | 22.243 | 2 | Rentuútreiðslur | 41.179 | 21.647 |
| **30.706** | **34.693** | | **Netto rentuinntøkur** | **32.341** | **35.876** |
| 1.750 | 2.355 | | Vinningsbýti av partabrøvum | 1.420 | 2.355 |
| 5.300 | 5.224 | | Kostnaður og provisjónsinntøkur | 5.300 | 5.224 |
| 505 | 886 | | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 505 | 886 |
| **37.251** | **41.386** | | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **38.556** | **42.569** |
| -4.717 | 3.057 | 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum og útlendskum gjaldoyra | -4.717 | 3.057 |
| 1.307 | 1.582 | | Aðrar vanligar inntøkur | 391 | 211 |
| 26.429 | 25.737 | 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 26.320 | 25.548 |
| 1.924 | 1.380 | | Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 1.924 | 1.381 |
| 0 | 10 | | Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 10 |
| 6.700 | -1.276 | | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 6.700 | -1.276 |
| 0 | 0 | 5 | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | -499 | 0 |
| **-1.212** | **20.174** | | **Úrslit áðrenn skatt** | **-1.213** | **20.174** |
| -79 | 3.631 | | Skattur | -80 | 3.631 |
| **-1.133** | **16.543** | | **Hálvársúrslit** | **-1.133** | **16.543** |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2008

Samtak | Norðoya Sparikassi

| 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK | Viðm. | | 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | **Ogn** | | |
| 55.431 | 28.836 | | Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankanum | 55.218 | 28.836 |
| 38.927 | 50.318 | | Ogn hjá fíggjarstovnum | 37.972 | 50.276 |
| 1.848.164 | 1.670.402 | | Útlán | 1.848.164 | 1.690.575 |
| 186.683 | 86.763 | | Lánsbrøv | 186.683 | 86.763 |
| 81.115 | 70.336 | | Partabrøv | 66.015 | 66.222 |
| 3.714 | 14.049 | | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 0 | 0 |
| 1.543 | 907 | | Kapitalpartur í tilknýttum fyritøkum | 11.581 | 11.448 |
| 84.232 | 69.381 | | Ítøkiligar ognir | 45.955 | 25.850 |
| 13.519 | 12.727 | | Onnur ogn | 9.172 | 6.726 |
| **2.313.328** | **2.003.719** | | **Ogn tilsamans** | **2.260.760** | **1.966.696** |
| | | | Skuld og eginpeningur | | |
| 281.000 | 180.000 | | Skuld til fíggjarstovnar | 232.000 | 150.000 |
| 1.657.847 | 1.461.587 | | Innlán | 1.660.994 | 1.461.588 |
| 32.097 | 29.890 | | Onnur skuld | 27.996 | 25.480 |
| 5.580 | 5.449 | | Avsetingar til útreiðslur | 2.966 | 2.834 |
| **1.976.524** | **1.676.926** | | **Skuld tilsamans** | **1.923.956** | **1.639.902** |
| 7.088 | 5.504 | | Ábyrgdarpeningur | 7.088 | 5.504 |
| 1.000 | 1.000 | | Gávugrunnurin | 1.000 | 1.000 |
| 329.125 | 303.746 | | Flutt frá undanfarnum árnum | 329.125 | 303.746 |
| 724 | 0 | | Regulering primo | 724 | 0 |
| -1.133 | 16.543 | | Hálvársúrslit eftir skatt | -1.133 | 16.543 |
| **336.804** | **326.793** | | **Eginpeningur tilsamans** | **336.804** | **326.794** |
| **2.313.328** | **2.003.719** | | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.260.760** | **1.966.696** |
| | | 6 | **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| 301.247 | 305.471 | | Ábyrgdir og aðrar skyldur | 301.247 | 305.471 |



# VIÐMERKINGAR

Samtak | Norðoya Sparikassi

| 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK | Viðm. | | 2008 1.000 DKK | 2007 1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 1 | Rentuinntøkur | | |
| 2.201 | 1.376 | | Renta av innistandandi í peningastovnum | 2.201 | 1.376 |
| 67.469 | 54.399 | | Renta av útlánum | 67.773 | 54.986 |
| 3.546 | 1.161 | | Renta av lánsbrøvum | 3.546 | 1.161 |
| **73.216** | **56.936** | | **Rentuinntøkur tilsamans** | **73.520** | **57.523** |
| | | 2 | Rentuútreiðslur | | |
| 7.889 | 2.684 | | Renta til peningastovnar | 6.488 | 2.086 |
| 34.435 | 19.446 | | Renta til innlán | 34.505 | 19.448 |
| 186 | 113 | | Renta til ábyrgdarapening | 186 | 113 |
| **42.510** | **22.243** | | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **41.179** | **21.647** |
| | | 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra | | |
| -1.602 | -659 | | Virðisjavnan av lánsbrøvum | -1.602 | -659 |
| -3.076 | 3.673 | | Virðisjavnan av partabrøvum | -3.076 | 3.673 |
| -39 | 43 | | Virðisjavnan av gjaldoyra | -39 | 43 |
| **-4.717** | **3.057** | | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans** | **-4.717** | **3.057** |
| | | 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | | |
| 1.409 | 1.349 | | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn, nevnd og umboðsráð | 1.409 | 1.349 |
| 8.726 | 7.876 | | Starvsfólkalønir | 8.726 | 7.876 |
| 1.318 | 1.198 | | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 1.318 | 1.198 |
| 888 | 724 | | Útreiðslur til sosiala trygd | 888 | 724 |
| **12.341** | **11.147** | | **Útreiðslur til starvsfólk tilsamans** | **12.341** | **11.147** |
| 14.088 | 14.590 | | Aðrar umsitingarútreiðslur | 13.979 | 14.401 |
| **26.429** | **25.737** | | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans** | **26.320** | **25.548** |
| | | 5 | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | | |
| 0 | 0 | | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum | 0 | 0 |
| 0 | 0 | | Úrslit av kapitalpørtum í tilknýttum fyritøkum | -499 | 0 |
| **0** | **0** | | | **-499** | **0** |
| | | 6 | Ábyrgdir og aðrar skyldur | | |
| 283.935 | 290.455 | | Ábyrgdir o.a. | 283.935 | 290.455 |
| 17.312 | 15.016 | | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 17.312 | 15.016 |
| **301.247** | **305.471** | | | **301.247** | **305.471** |

# LYKLATØL 1. HÁLVÁR

Samtak | Norðoya Sparikassi

| 2008 | 2007 | Viðm. | | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17,0 | 16,7 | | Solvensprosent | 17,4 | 17,0 | 20,0 | 27,1 | 28,3 |
| 17,0 | 16,7 | | Kjarnukapitalprosent | 17,4 | 17,0 | 20,0 | 27,1 | 28,3 |
| -0,4 | 6,3 | | Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | -0,4 | 6,3 | 2,5 | 3,9 | 4,5 |
| -0,3 | 5,2 | | Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | -0,3 | 5,2 | 2,0 | 3,1 | 3,6 |
| 0,97 | 1,78 | | Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 0,97 | 1,79 | 1,38 | 1,53 | 1,63 |
| 1,3 | 1,1 | | Rentuváði | 1,3 | 1,1 | 2,5 | 1,5 | 1,3 |
| 0,0 | 0,0 | | Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 0,0 | 0,0 | | Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 113,1 | 115,7 | | Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 112,8 | 117,1 | 100,7 | 111,3 | 101,9 |
| 48,8 | 18,1 | | Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 51,7 | 20,4 | 85,7 | 73,9 | 149,3 |
| 52,4 | 57,2 | | Stórir kundar tilsamans | 52,4 | 57,2 | 49,2 | 22,8 | 37,9 |
| 1,3 | 1,1 | | Burturleggingarprosent | 1,3 | 1,1 | 1,7 | 2,9 | 3,4 |
| 0,3 | 0,0 | | Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,3 | 0,0 | 0,1 | 0,2 | 0,2 |
| 2,1 | 12,4 | | Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 1,1 | 12,4 | 13,2 | 8,0 | 1,1 |
| 5,5 | 5,1 | | Útlán í mun til eginpening | 5,5 | 5,2 | 4,4 | 3,9 | 3,6 |

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2008 HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA

## Úrslit

Norðoya Sparikassi hevði fyrra hálvár 2008 eitt hall áðrenn skatt uppá 1,2 mió. kr., móti einum vinningi uppá 20,2 mió. kr. fyrra hálvár 2007. Verður sæð burtur frá virðisjavnan og burturleggingum, er úrslitið fyrra hálvár 2008 10,2 mió. kr. móti 15,8 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Samanumtikið hevði sparikassin væntað sær meira av fyrra hálvári, og kann tí ikki siga seg vera nøgdan við úrslit sparikassans fyrra hálvár 2008.

## Broytingar í Hálvársroknskapinum

Hálvársroknskapur Sparikassans inniheldur nú, fyri at lúka krøvini í roknskaparkunngerðini og eftir áheitan frá Fíggjareftirlitinum, roknskapartøl fyri samtakið. Samtaksroknskapurin fevnir um Norðoya Sparikassa, Sp/f Heim og P/f Vørður, sum eru 100% ogn hjá Norðoya Sparikassa. Av hesi orsøk eru bæði omanfyri nevndu feløg áløgd at nýta sama roknskaparhátt sum sparikassin.

Grundað á hetta, hevur Fíggjareftirlitið upplýst sparikassan um avgerðandi skeivleikar í broytingunum av virðisásetingum av kapitalpørtum í tilknýttum fyritøkum. Hesir skeivleikar eru nú rættaðir og hava viðført at úrslitið av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum nú er -499 tkr. í mun til 5.584 tkr. fyri broytingina.

Eisini er “virðisjavnan av virðisbrøvum” eftir áheitan frá Fíggjareftirlitinum nú -4.717 tkr. í mun til -303 tkr. fyri broytingina.

Hesar broytingar viðføra at úrslitið eftir skatt nú vísir eitt hall uppá 1,1 mió. kr., í mun til ein vinning uppá 7,4 mió. kr. fyri broytingina.

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 2.261 mió. kr. móti 2.270 mió. kr. fyri broytingina, og kemur hetta av, at kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum nú hava eitt virði uppá 11.581 tkr. í mun til 17.663 tkr., og at partabrøv nú hava eitt virði uppá 66.015 tkr. í mun til 69.704 tkr. Broytingarnar eru gjørdar eftir ásetingum frá Fíggjareftirlitinum.

## Inntøkur

Netto-rentuinntøkur sparikassans fyrra hálvár vóru 32,3 mió. kr. móti 35,9 mió. kr. fyrra hálvár 2007, ið eru 3,6 mió. kr. lægri enn somu tíð í fjør. Seinastu árini hevur kappingin staðið um útlánini, men henda gongdin er nú vend til fyrimuns fyri tey, sum eiga pening á bók. Skuld til peningastovnar øktist við 82 mió. kr., innlánini øktust við 199 mió. kr., meðan útlánini øktust við 158 mió. kr. Hetta svarar til ein inn- og útlánsvøkstur í prosentum uppá ávikavist 14% og 9%. Eitt av aðalmálum sparikassans er, at rímiligt samsvar er ímillum inn- og útlán, og arbeiðir sparikassin miðvíst at røkka hesum máli. Sparikassin hevur í ár tillagað rentuna tvær ferðir, 1. mai og aftur 11. august. Við hesum rentutillagingum væntar sparikassin at nettorentan fyri alt árið 2008 verður á sama støði sum í 2007.

## Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.a.

Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.a. gjørdist eitt hall uppá 4,7 mió. kr. fyrra hálvár 2008, móti einum avlopi uppá 3,1 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Sparikassin hevði eitt tap av skrásettum virðisbrøvum uppá 10,2 mió. kr. fyrra hálvár 2008, men saman við vinningi av óskrásettum partabrøvum sama tíðarskeið, gjørdist virðisjavnan eitt hall uppá -4,7 mió. kr. Sparikassin hevur í 2008 broytt roknskaparhátt viðvíkjandi virðisáseting av óskrásettum partabrøvum, frá útveganarvirði til mett marknaðarvirði.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 26,3 mió. kr. fyrra hálvár í ár, móti 25,5 mió. kr. fyri sama tíðarskeið í fjør.

## Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Netto-avskrivingar og -burturleggingar uppá skuldarar vóru 6,7 mió. kr. fyrra hálvár 2008, móti eini inntøkuføring uppá 1,3 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Sparikassin hevur mett um tapsvandan, og er størsti parturin av burturleggingnum fyrra hálvár 2008 tengdur at fiskivinnuni, ið umboðar umleið 150 mió. kr., ella umleið 7% av samlaða kredittváða sparikassans. Sparikassin er ikki við í nakrari byggiverkætlan og hevur tí lítlan og ongan váða innan hesa vinnugrein.

## Fíggjarstøðan

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 2.261 mió. kr. móti 1.967 mió. kr. fyrra hálvár 2007. Hetta er ein vøkstur uppá 15,4%. Innlánið er nú 1.660 mió. kr. móti 1.461 mió. kr. fyrra hálvár 2007, sum svarar til ein vøkstur uppá 13,6%. Útlánið er nú 1.848 mió. kr. móti 1.690 mió. kr. fyrra hálvár 2007, svarandi til ein vøkstur uppá 9,3%.

Eginpeningur sparikassans er nú 336,8 mió. kr., og er farna árið øktur við 10,0 mió. kr., ið er ein vøkstur uppá 3,1%. Eginognin er nú 14,9% av samlaðu fíggjarstøðuni móti 16,6% fyrra hálvár 2007.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldføri sparikassans er nú 335 mió. kr. móti 232 mió. kr. í 2007. Gjaldførið er 42% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans, lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans 15%, her krevur lógin krevur 10%.

Solvensur sparikassans er 17,4%, í mun til 17,0% fyrra hálvár 2007. Lógin krevur 8%.